# Silvi kemur til býin

**Nýggi maskotturin hjá Norðoya Sparikassa verður avdúkaður í Leirvík og Klaksvík leygardagin. Hann er partur av nýggjum barnaátaki hjá sparikassanum**

BARNAPENGAR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Leygardagin kemur Silvi til býin.

Silvi er navnið á nýggjum maskotti hjá Norðoya Sparikassa, sum verður avdúkaður á stórum barna- og familjutiltøkum í Klaksvík og Leirvík leygardagin.

– Vit hava í nógv ár havt eitt gott tilboð til tey ungu við gull-konto, og nú leggja vit okkum at gera eitt spildurnýtt og spennandi tilboð til børnini, sigur Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í Norðoya Sparikassa.

Silvi verður ímyndin av nýggju barnakontoini. Silvi verður maskottur, og hann verður frá mánadegnum eisini nýggja sparibússan hjá sparikassanum í Norðoyggjum.

### Leirvík og Klaksvík

Tiltøkini leygardagin bjóða undirhald av ymsum slagi. Lagt verður fyri í Leirvík kl. 11.00, tá Silvi kemur til bygdina.

Skrúðgonga verður av ferjuleguni til hølini hjá Norðoya Sparikassa, har skipað verður fyri ymsum á økinum við sparikassan.

Kl. 14.10 kemur Silvi til Klaksvíkar, og har verður gingið í skrúðgongu til fótbóltsvøllin. Á fótbóltsvøllinum verður so skipað fyri líknandi undirhaldi sum í Leirvík.

### Ymiskt undirhald

Á skránni er millum annað tónleikur. Faroe Teens fara saman við Rannu Lützen at syngja nakrar sangir, Karl Martin Samuelsen fer eisini at syngja barnasangir, og so verður nýggi Silva-sangurin eisini spældur.

Hendan sangin hevur Kári Jacobsen smíðað, og tað er Linda MacDonald, sum syngur hann. Linda hevur áður gingið undir navninum Singing Linda í Danmark.

Klaksvíkar Fimleikafelag fer at sýna fram og Fjotte og Bobo fara spæla klovn. Frásøgumaður verður Kári Sólstein.

### Nýggjar ráðgevar

Nýggja barnaátakið hjá Norðoya Sparikassa fer av bakkastokki við nógvum undirhaldi, men ætlanin er, at tilboðið til børnini skal mennast við tíðini.

Norðoya Sparikassi setti í fjør ein ungdómsráðgeva, og royndirnar av hesi skipan eru so góðar, at nú skal eitt fólk í sparikassanum verða ráðgevi fyri barnakontoina. Hesi bæði fólkini skulu framyvir verða barna- og ungdómsráðgevar hjá sparikassanum.






# Brandbilur til Svínoyar

**Í gjár varð nýggi brandbilurin hjá svínoyingum fluttur út í oynna. Svínoyar kommuna hevur eisini keypt nýggja gravimaskinu**

BRANDBILUR
*Eyðun Klakstein*

Í gjár varð brandbilurin, sum svínoyingar hava keypt í Vestmanna, fluttur til oynna.

Gamli Toyota-brandbilurin er í sera góðum standi, og Svínoyar kommuna hevur fingið hann til keyps fyri sera lagaligan prís.

Í brandbilinum er tangi upp á 500 litrar, og pumpiútgerð hoyrir eisini til. Bilurin hevur bensinmotor.

– Vit hava fingið brandbilin við teirri treyt, at hann verður brúktur sum brandbilur. Tað er stórur áhugi fyri hesum bilinum sum ellisakfar, sigur Pól Sundskarð, bygdaráðsformaður í Svínoy.




*Hesin brandbilur skal nú gera tænastu í Svínoy. Kommunan í Svínoy hevur keypt gamla Toyota-brandbilin frá vestmenningum*

### Samstarv

Svínoyingar hava tosað við sløkkiliðið í Klaksvík um samstarv, og tað eru klaksvíkingar sinnaðir fyri.

Samstarvið við sløkkiliðið í Klaksvík skal millum annað føra við sær, at nakrir svínoyingar fáa kunnleika til eldsløkking og útgerðina, sum kemur í oynna.

Ætlanin er at byggja eitt bilhús í Svínoy, so brandbilurin kann standa væl.

### Nýggja gravkúgv

Umframt brandbilin var eisini ein nýggj gravkúgv hjá Svínoyar kommunu flutt til oynna í gjár, og harafturat kom ein lastbilur afturíaftur, sum hevur verið til umvælingar.

Í Svínoy hava tey ruddað seinastu tíðina, og sandbáturin, sum sigldi út við bilunum og maskinuni, skuldi taka eina rúgvu av burturkasti við sær úr oynni aftur.

– Her er ein rúgva av burturkasti savnað saman, og tað verður gott at sleppa av við tað, sigur Pól Sundskarð, bygdaráðsformaður.

# Umvæla maskinuna

**Maskinan hjá rækjutrolaranum Sjúrðaberg verður yvirhálað og reinsað, áðrenn skipið fer til fiskiskap aftur um einar 10 dagar**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** JFK-trolarin Sjúrðaberg hevur síðani hálvan august ligið í Klaksvík, og tað ganga helst eini 10 dagar, áðren rækjutrolarin fer aftur til fiskiskap.



*Sjúrðaberg fer aftur til fiskiskap um einar 10 dagar, og tá liggur leiðin í Svalbard*

Síðani Sjúrðaberg kom aftur av Flemish Cap, har hann hevur verið meginpartin av árinum, eru umvælingar gjørdar á maskinuna. Maskinan verður yvirhálað og reinsað á bedingini í Klaksvík.

Sjúrðaberg fer aftur til fiskiskap um einar 10 dagar, og tá liggur leiðin í Svalbard. Einir 15 mans eru við Sjúrðaberg, og skipari er Óli Sørensen.

Hitt rækjuskipið hjá JFK, Fuglberg, er á Flemish Cap, og fiskiskapurin hevur ikki verið nakað serligur seinastu tíðina.

Prísurin á rækjum er í botni, og tað ger umstøðurnar hjá rækjuskipunum sera truplar.

# Trupul at finna loysn

**Skúlastríðið í Kalsoynni stendur við, og foreldrini halda, at tað verður trupult at finna eina loysn á staðnum**

SKÚLASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*

**Kalsoy:** Nú eru næstan tvær vikur, síðani børn fóru aftur í skúla. Men í Kalsoynni eru tað framvegis átta børn, sum ikki ganga í skúla.

Hetta eru børnini á Trøllanesi, sum eru tikin úr skúlanum, tí foreldrini vilja hava skúlagongd aftur í Mikladali, soleiðis sum tey hava fingið lyfti um frá myndugleikunum.

Torbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismaður, hevur skotið upp, at samskiparin av Útoyggjaálitinum, Olga Biskopstø í Klaksvík, verður meklari í stríðnum, og sambært Dimmalætting er Olga sinnað fyri hesum.

### Eingin dialogur

Foreldrini á Trøllanesi, halda, at tað verður trupult at finna eina loysn á staðnum. Tey hava roynt at fingið ein dialog í lag við bygdaráðið, men hendan royndin druknaði í kjaki um, hvussu nógv fólk skuldu vera á fundi, og um nakar uttanveltaður persónur skuldi verða hjástaddur.

Børnini á Trøllanesi hava onga frálæru fingið eftir summarfrítíðina, og hetta er við at gerast ein trupulleiki. Foreldrini hava roynt at fingið bøkur til børnini frá skúlanum, men hetta hava lokalu skúlamyndugleikarnir nokta teimum.

Tí fáa foreldrini ikki undirvíst børnunum heima sum er.



Bjarni Djurholm:

# Dúgvan skal sigla allan dagin

**Frá hálvum oktober skal Dúgvan sigla aftur og fram um Leirvíksfjørð frá klokkan fimm á morgni til á midnátt. Hetta hevur landsstýrismaðurin við samferðslumálum gjørt av. Hann biðjur nú um eykajáttan á 305 túsund krónur til raksturin av leiðini**

SAMFERÐSLA
*John Johannessen*

Fólk í Norðoyggjum fáa í næstum betri samband um Leirvíksfjørð.



*Landsstýrismaðurin við ábyrgd fyri samferðslumálum hevur gjørt av, at Dúgvan frá hálvum oktober skal sigla um Leirvíksfjørð frá klokkan fimm á morgni til á midnátt*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við ábyrgd fyri samferðslumálum, hevur í samráð við Strandfaraskip Landsins gjørt av, at Dúgvan skal sigla um Leirvíksfjørð frá klokkan fimm um morgunin til á midnátt hvønn dag.

– Undirtøka er fyri hesi ætlan í landsstýrinum, og eg fari nú at biðja um eykajáttan, so vit kunnu seta hetta í verk frá hálvum oktober og árið út, sigur Bjarni Djurholm.

### Best við tveimum ferjum

Bjarni Djurhom heldur, at besta loysnin á akutta trupulleikanum á Leirvíksfjarðarleiðini hevði verið at siglt við tveimum skipum ella at havt eitt størri skip.

– Tá Scania sigldi sóu vit beinan vegin, at propparnir, sum koma í ávísar tíðir á degnum, hvurvu. Men Stranferðslan hevur einki skip at seta inn, og tí mugu vit bara velja at økja túratalið við Dúgvuni, sigur Bjarni Djurholm.

Bjarni Djurholm sigur, at tað hevur verið hugsað um at seta Sam inn at hjálpa Dúgvuni. Men manningin á Sam hevur mælt frá hesum, tí hann er ikki egnaður til farvatnið. Og harafturat skal Sam eisini brúkast sum avloysaraskip um Vestmannasund, millum annað tá veðrið er ringt og tað ikki er gott hjá tungu Ternuni at leggja at ferjulegunum.

### 300 túsund

Sambært Bjarna Djurholm fer tað at kosta 305 túsund krónur brutto at lata Dúgvuna sigla frá klokkan fimm á morgni til midnátt um Leirvíksfjørð. Hendan peningin biðjur hann um á eykajáttanarumbønini fyri august. Og hann roknar við at fáa peningin játtaðan.

– Undirtøka er fyri hesum í landsstýrinum. Vit vita, at ferðslan bara fer at økjast, og at okkurt tí má gerast, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við ábyrgd fyri vinnumálum.

Rúna Sivertsen:

# Leirvíksleiðin er kaos

*Rúna Sivertsen, tingkvinna úr Norðoyggjum, vil hava túratalið um Leirvíksfjørð økt beinan vegin*



Rúna Sivertsen.

**Tað er vorðin gerandiskostur, at fólk ikki sleppa við Dúgvuni um Leirvíksfjørð, tá tey ætla sær. Rúna Sivertsen, tingkvinna, metir støðuna vera kaotisk, og heitir hon í brævi til landsstýrismannin við samferðslumálum, um at økja túratalið bainanvegin**

SAMFERÐSLA
*John Johannessen*

»Undirritaða heitir staðiliga á Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum, um at økja túratalið um Leirvíksfjørð beinanvegin.«

Soleiðis ljóðar stutta brævið dagfest 29. august, sum Rúna Sivertsen, tingkvinna hevur sent Bjarna Djurholm, landsstýrismanni og floksfelaga hennara í Fólkaflokkinum.

Rúna Sivertsen sigur við Sosialin, at brævið er enn ein av hennara mongu royndum at fáa betrað um ferðasambandið um Leirvíksfjørð, sum í løtuni als ikki er nøktandi.

– Dúgvan klárar als ikki at nøkta tørvin, og tí er kaos á ferjulegunum báðu megin hvønn dag, sigur

### Sleppa ikki við

Rúna Sivertsen sigur tað vera heilt vanligt, at fleiri bilar standa eftir á ferjuleguni, tí pláss ikki er fyri teimum umborð á Dúgvuni. Og júst tí, at støðan hevur verið soleiðis leingi, eru fólk farin at seta bilar sínar í bilarøðina kvøldið fyri, at tey skulu við, og hetta skapar kaos.

– Í Klaksvík er tað vorðið soleiðis, at fólk, sum skulu við Dúgvuni næsta ella triðja túrin um morgunin, seta bilin í bilarøðina longu kvøldið fyri, og so skapar hetta stórt kaos og forargilsi á ferjuleguni teir fyrstu túrarnar um morgunin. Hetta er eisini ein stórur trupulleiki fyri manningina, sum einki fær gjørt, greiðir Rúna Sivertsen frá.

Og Rúna Sivertsen roynir eisini at geva eina mynd av, hvussu tað er at vera norðoyingur og skula við Dúgvuni klokkan hálvgum átta á morgni, fyri at sleppa til Havnar til arbeiðis.

– Dúgvan siglur klokkan hálvgum átta. Men skalt tú hava nakra vón um at sleppa við, mást tú í seinasta lagi vera á ferjuleguni klokkan trý korter til sjey – og tá er tað kortini ikki vist, at tú sleppur við, sigur Rúna Sivertsen.

Rúna Sivertsen greiðir eisini frá, at tað javnan er so galið, at bilarøðirnar ikki rúmast á ferjuleguni, og tí leingjast út í býin.

– Hesum kunnu útlendingar, sum langt framman undan hava lagt eina ferð í Føroyum til rættis, sjálvsagt ikki vita av, og tí endar tað eisin ofta við, at útlendsku bilarnir als ikki sleppa við, sigur tingkvinnan úr Klaksvík.

### Farmurin forðar

Rúna Sivertsen vísir á, at ein partur av trupulleikan á Leirvíksfjarðarleiðini er, at nógvur farmur verður fluttur um Leirvíksfjørð somu túrarnar, sum nógv ferðafólk skulu við.

– Umframt, at hetta ger, at nógvir bilar koma at standa eftir, ger tað eisini at fólk eru noydd at vassa í vatni frá fiskabingjum á dekkinum og síðani draga hetta við sær inni í bilarnar. Og hetta er eisini galdandi sunnudagar. Tað ber snøgt sagt ikki til at fara væl klæddur um Leirvíksfjørð.

– Eg skilji ikki, at tað ikki kann bera til at flyta farmaflutningin til um náttina, sigur Rúna Sivertsen.

Tingkvinnan úr Klaksvík kundi eisini hugsað sær eina bíleggingarskipan, so tú kundi bílagt tær pláss við ferjuni dagar frammanundan, at tú skalt avstað. Men hon hevur fingið at vita, at hetta ikki ber til.

– Trupulleikin hjá okkum er akuttur. Tað nyttar ikki bara at siga, at vit fáa ein undirsjóvartunnil, tí vit mugu fáa eina loysn, til vit fáa tunnilin, sigur Rúna Sivertsen.


